


www.oljan.fo

**Jan Müller** 18 - 04 - 2012

# Statoil selt 2300 benzinstøðir

Statoil hevur selt tær 2.300 benzinstøðirnar, sum dótturfelagið Fuel & Reatil hevur í teimum skandinavisku londunum, Baltalondunum, Russlandi og Póllandi. Keypari er kanadiska felagið Alimentation Couche-Tard, og sambært norskum fjølmiðlum gevur handilin Saatoil einar átta milliardir krónur í kassan. Í Danmark hevur Statoil 230 mannaðar og 130 ómannaðar støðir og hevði í fjør umleið ein fjórðing av marknaðinum ella á leið tað sama sum Shell. Torgrim Reitan, fíggjarstjóri í Statoil, sigur í einari fráboðan, at tilboðið frá Alimentation Couche-Tard er ein góð loysn fyri allar partar, sum hann tekur til. Hóst eigaraskiftið kunnu teir nýggju eigararnir brúka navnið Statoil til ársenda 2019. Eygleiðarar siga, at við handlinum fær Statoil meiri kapital at arbeiða við, samstundis sum felagið kann savna orkuna um høvuðsvirksemið. Couche-Tard byrjaði við einari støð í Quebec í Kanada í 1980 og hevur í dag 5.800 handlar og 53.000 starvsfólk. Av teimum 5.800 handlunum eru meiri enn 4.200 benzinstøðir. Felagið hevur fyrr keypt støðir frá Shell og ExxonMobil.